# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Sjálvandi skulu blaðfólkini framhaldandi seta navn sítt við tað, sum tey skriva óansæð lønarkrøv. Tað fara tey so framhaldandi at gera her í blaðnum*

*oddagreinin*

## Ábyrgdin er ein sjálvfylgja

Vit hava nú fingið fjølmiðlaábyrgdarlógina, og harvið kann ábyrgdin av tí, ið sagt, skrivað og víst verður í miðlunum greitt plaserast. Eitt kærkomið framstig.

Hjá miðlafólkum átti ein slík lóg at verið óneyðug – bara sagt út frá tí, at gera vit okkara arbeiði – okkara handverk til lýtar – so er einki at koma eftir, við ella uttan ábyrgdarlóg. Men vit fegnast sjálvsagt um hana, tí hon er vónandi ein trygd fyri, at miðlarnir taka neyðug atlit, og at borgarin harvið kann kenna seg tryggan.

Vit kunnu so spyrja, um vit duga nóg væl at taka atlit og vísa ábyrgd. Formaður Blaðmannafelagsins segði við útvarpið í gjár, at verður ábyrgdin hjá blaðfólkunum størri, kann tað væl hugsast, at tíðindafólkini venda aftur til tað gamla, ikki at skriva sítt navn undir greinarnar.

Handan viðmerkingin stendur vónandi bara fyri formansins rokning. Vit vænta ikki, at limirnir taka undir við nøkrum so jánkasligum. Sjálvandi skulu blaðfólkini framhaldandi seta navn sítt við tað, sum tey skriva óansæð lønarkrøv. Tað fara tey so framhaldandi at gera her í blaðnum. Vit kunnu leggja afturat, at vit í skjótt 10 ár ikki hava hýst dulnevndum lesarabrævum – júst fyri at sleppa undan huldumannaskrivingini.

Men at hava ábyrgd, tað forpliktar eisini. Tað er eitt krav, at »søgurnar« vit borðreiða við, eru nóg væl undirbygdar – og ikki byggja á ynski ella irritatiónir hjá ávísum miðlafólkum.

Seinasta vikuskifti róði forkvinna Føroya Arbeiðarafelags í viðtali í Dimmalætting fram undir, at ein nýggjur arbeiðaraflokkur átti at verði stovnaður. Hetta fekk Dimmalætting til eina forsíðusøgu um, at »fólk fyrireika ein nýggjan flokk«. Aðrir miðlar við útvarpinum á odda vórðu drigin upp á tráð og endurtóku hesa søguna upp í saman, hóast als eingin søga var. Eingin fyrireikar nýggjan flokk, men ein fakfelagsleiðari heldur, at onkur *átti* at gjørt tað.

Nógv rok var eisini um ein landsstýrismann og eina forkvinnu í almennum grunni. Upprunin var, at hon sum almennur stovnsleiðari hevði tikið sær pening, hon ikki átti rætt til og tí varð noydd at leggja starvið frá sær. Hetta málið er endað við, at løgmaður er farin at kanna embætisførsluna hjá landsstýrismanninum, tí at málið í miðlunum vavt upp í ein ellibita og blandað saman við eitt heilt annað mál.

Hetta eru tvey dømi um mál, ið ikki hava fingið røttu viðferðina í miðlunum, og har onnur áhugmál stýra »søgunum«. Sjálvandi kunnu vit øll gera mistøk – og eingin okkara er lýtarleysur.

Fjølmiðlaábyrgdarlógin verður nú við til at tryggja, at vit í fjølmiðlunum oftari taka í egnan barm – í síðsta enda fólkaræðinum at frama.

**Sosialurin**

# Gerðabøur – ein miskiljing?

**EYÐGUNN SAMUELSEN**
býráðslimur
í Klaksvík



Tað er ikki sørt øtkymlandi at lesa í fjølmiðlunum, at spurningurin um byggiloyvi til FK á Gerðabø snýr seg um, hvørt FK skal fáa loyvi at byggja, ella Gerðabøur skal friðast. At útleggja málið á henda hátt er ikki í samsvar við veruleikan.

Økið Gerðabøur er bæði í verandi ásetingum og í skjótt lidnu endurskoðaðu byggisamtyktini lagt út til alment byggjarí. Hugsa verður um skúlar, kollegii og møguligar eldraíbúðir. Onki uppskot hevur verið frammi um at friða Gerðabø, hvørki í málsviðgerðini av byggiloyvinum til FK ella á býráðsfundinum har prinsipielt byggiloyvi varð samtykt. At onkrir býráðslimir fara at hugleiða í endanum á eini málsviðgerð er hent fyrr.

Tað, ið støða varð tikin til bæði í nevndum og á býráðsfundinum var um staðseting av FK hóskaði saman við tí, ið annars er ætlanin at byggja á Gerðabø. At tað var natúrligt at ein handil kom at liggja á sama øki sum skúlar og bústaðir til ung og eldri, helt meirilutin í býráðnum, og tí var prinsipiella byggiloyvið samtykt.

Um býráðslimir ynsktu, at býráðið skuldu fáa høvi til at viðgera eina friðing av Gerðabø, so høvdu teir fleiri møguleikar at koma við einum uppskoti um hetta, bæði í byggi-og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og á sjálvum býráðsfundinum. Hetta hendi sum kunnugt ikki, og tí er ikki rætt at lýsa málið sum ein spurning um fyri ella ímóti friðing av Gerðabø.

Tað er gott og neyðugt at borgararnir luttaka í tjakinum um, hvussu okkara býur skal skipast í framtíðini, men fortreytirnar eiga at vera rættar, tá ið tjakast verður. Seinni í heyst verður eitt gott høvi at tjakast um okkara framtíðar býarskipan, tí byggi- og býarskipanarnevndin fer at skipa fyri einum borgarafundi, har uppskot til endurskoðaða býarskipan verður løgd fram til tjak.

# Dansinátt í Norðurlandahúsinum

**DANSINÁTT**

*Sláið Ring – landsfelag føroyskum dansi at frama.*



Aftur í ár bjóða Norðurlandahúsið og Sláið Ring – landsfelag føroyskum dansi at frama, til almenna dansinátt í Norðurlandahúsinum, har øll eru hjartaliga vælkomin. Dansináttin verður nú leygardagin, hin 8. juli.

Til dansináttina í ár í 2006, er einki ávíst dansifelag, sum er vertur. Tað verða vit, sum koma í dansin sum mynda dansin. Tað verða vit, sum eru við í ringinum, sum eru dansurin, bæði skiparar og luttakarar. Tað verða vit, sum avgera hvat verður kvøðið ella framført, hvørt tað verður riðið, siglt ella svomið. Um kvøðið verður um kappabrøgd ella kærleika. Ja, møguliga verða ein ella fleiri tættir eisini havdir á gólvi.

Norðurlandahúsið og Sláið Ring vóna og vænta, at fleiri leggja leiðina framvið Norðurlandahúsinum nú leygarkvøldið.

Møguleiki skuldi eisini verið fyri at kunna seg um, hvørt føroyski dansurin er partur av føroyskari mentan. Vit í Sláið Ring hava lisið í bløðunum um visión 2015, men um føroyski dansurin er við í hesum ætlanum og hvør umboðar hann, hava vit einki frætt um.

Tiltakið plagar at vera væl vitjað. Her koma bæði útlendsk ferðafólk og útisetar, ið eru heima í summarfrí, og her koma ikki minst dansiáhugað búgvandi her á landi.

Byrjað verður kl. 22.00 og dansurin endar kl. 02.00. Er dansurin góður, verður hildið á eitt sindur longur. Kostnaðurin er kr. 50,-.

**62° 00. 003 N**
**007° 00. 069 V**

Fugloy ferðug
Svínoy so sonn
Viðoy safir
Borðoy granni
Kunoy leingist
Kalsoy norðanfjørðs
Eysturoy so møk
Streymoy ei støk
Vágar ger tøk
Mykines skymast
Nólsoy ein krokodilla
Koltur ein boltur
Hestur juvel
Sandoy nice
Skúvoy halló
Stóra Dímun 16
Lítla Dímun køld
Suðuroy slotar

Sólin sær + 18 stig

*Ó. J. Thomsen*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.